Sosialurin
Nr. 244 - 18. desember 2006

# Jólaálitið gjørdist onki jólatrøll

**Í morgun varð álitið frá Stjórnarskipanarnevndini handað. Hetta var smáar tvær vikur áðrenn evstamark, og soleiðis gjørdist jólaálitið, sum Jóan Pauli Joensen hevur valt at kalla álitið, onki jólatrøll**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fekk í morgun handað álitið frá Stjórnarskipanarnevndini um Stjórnarskipan Føroya. Tí var kallað inn til tíðindafund í Tinganesi kl. 9.30.

Bjørt Samuelsen, kunningarráðgevi, bjóðaði vælkomin og gav síðani Jóan Paula Joensen, formanni í Stjórnarskipanarnevndini orðið.

– Alt hevur sína tíð, og tíðin vit hava fingið at skrivað álitið, er eisini um at vera av, soleiðis legði Jóan Pauli Joensen fyri. Nevndin hevði 31. desember 2006 sum evstamark fyri, nær álitið skuldi verða latið av teirra hondum, og tá álitið varð handað í dag, so gjørdist Jólaálitið onki jólatrøll.

Jóan Pauli Joensen vísti á, at tá fyrra álitið frá teirra síðu varð rópt Flagdagsáliti, var tað púra natúrligt, at hetta álitið fær heitið Jólaálitið.

**Løgmaður ella forsætisráðharri**

Jóan Pauli Joensen greiddi síðani í stuttum frá arbeiðinum hjá bólkinum og hvussu hann hevði virkað. Jóan Pauli staðfesti eisini, at hóast stóra og umfatandi evni, og hóast øll ikki altíð hava verið á einum málið um, hvussu ymsu partarnir skuldu orðast, so er bólkurin nú samdur um tað mesta.

Síðani nam Jóan Pauli eitt sindur við ítøkiligar orðingar og uppskot í álitinum. Eitt nú um at strika gomlu heimastýrishugtøkini sum Landsstýrið, løgmaður og landsstýrismaður, og heldur nýta heitir sum stjórn og forsætisráðharri.

Í hesum sambandi er áhugavert at nevna stykki 1 í grein 59 í álitinum frá Stjórnarskipanarnevndini, sum er um umskipan, har tað stendur soleiðis:

(1) Løgmansembætið kann umskipast sambært tinglóg.

(2) Verður løgmansembætið umskipað, verður løgmaður nevndur forsætisráðharri og tingformaður nevndur løgmaður.

(3) Tá verður løgmaður fólkavaldur og samstundis evsta umboð landsins í mun til fremmandar ríkisleiðarar og eigur harumframt heimildirnar at leiða og samskipa tingsins virki, at staðfesta lógir og

at seta og loysa úr starvi landsstýrismenn eftir áheitan frá forsætisráðharra.

(4) Í førum har meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum atkvøður fyri, skal løgmaður loysa landsstýrismann úr starvi."

Jóan Pauli Joensen segði víðari, at hann vónaði, at løgmaður tekur málið í allarstørsta álvara og sær til, at tað verður viðgjørt politiskt. Somuleiðis segði formaðurin í Stjórnarskipanarnevndini, at tað var hansara inniligasta vón, at arbeiði, sum tey í bólkinum nú hava gjørt, verður til stórt gagn og vælsignilsi.

**Innihaldsríkt politiskt arbeiði**

Við hesum orðum tók Jóan Pauli Joensen í hondina á Jóannes Eidesgaard, og handaði honum 130 síður rúgvusmikla álitið. Løgmaður takkaði nevndini fyri álitið og fyri arbeiðið, tey høvdu lagt eftir seg. Serliga ynskti hann at takka Jóan Paula Joensen, sum sambært løgmanni hevur víst ótrúligt hegni til at halda saman upp á fólkið í bólkinum. Tí sum Jóannes Eidesgaard sjálvur nevndi, og sum Jóan Pauli Joensen eisini var inni á, so hava ósemjurnar verið mangar.

Jóannes Eidesgaard hevur sjálvur verið partur av nevndini stórt sæð alla tíðina, og hann heldur at arbeiðið hevur verið ótrúliga áhugavert.

– Hetta hevur verið eitt tað mest innihaldsríka politiska arbeiði, eg havi verið við til, segði Jóannes Eidesgaard.

Hann vísti síðani á, at álitið nú skal til politiska viðgerð og at tað verður landsstýrið, sum skal avgera nær tað kemur fyri tingið.

– Men tað verður so ikki áðrenn jól kann eg lova fyri, segði Jóannes Eidesgaard skemtandi. Hann ynskir, at tað kemur fyri fyrst í komandi ári, soleiðis at tað er viðgjørt áðrenn komandi løgtingsval.

– Og vónandi kemur álitið so heilskapað niðan í tingið, segði Jóannes Eidesgaard so at enda.

Tá tingið er liðugt at viðgera álitið, skal tað ætlandi út til fólkaatkvøðu.



*Jóan Pauli Joensen og Edmund Joensen í Eysturstovu í Tinganesi í morgun. Edmund Joensen er saman við Bárður Nielsen og Lisbeth L. Petersen, politisku umboðini hjá sambandsflokkinum í Stjórnarskipanarnevndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**FAKTA**

Ein stjórnarskipan er ein lóg, sum er grundarlagið undir øllum øðrum lógum. Men tað ber eisini til at siga, at hon er oman fyri allar aðrar lógir!
Stjórnarskipanin ásetur vanliga
(1) hvørjar stovnar eitt land hevur: ting, stjórn, dómstólar, landsbanka, umboðsmann og aðrar - og valdsbýtið teirra millum;
(2) hvørji viðurskiftini eru úteftir, t.d. um landið er í samveldi við onnur;
(3) hvørji rættindini hjá fólkinum mótvegis landsins stovnum eru.

**kelda: www.ssn.fo**



*Jóan Pauli Joensen, formaður í Stjórnarskipanarnevndini, handar Jóanes Eidesgaard álitið um Stjórnarskipan Føroya*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Stjórnarskipanarnevndin:**
Jóan Pauli Joensen, formaður
Kári á Rógvu, næstformaður
Bárður Larsen, nevndarlimur
Ingibjørg Berg, nevndarlimur
Jóannes Hansen, nevndarlimur
Gurið Ann Joensen, nevndarlimur
Herluf Sigvaldsson, nevndarlimur
Birita L. Poulsen, nevndarlimur

Rúni Rasmussen, skrivari

Álitið er at finna á heimasíðuni hjá nevndini www.ssn.fo, og annars verður ein bóklingur sendur til hvørt húski um Stjórnarskipan Føroya